KÍF-Kyndil 18-31 (9-17):

# Summarið er ávegis

**Hóast illfýsið veður enn er gerandiskostur, so eru kollfirðingarnir longu farnir í summarfrí, og tí hevði Kyndil lætt spæl mikukvøldið**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Kyndil slepti ongan tíð takinum, sum teir fingu á KÍF, og tá kollfirðingar so fóru í summarfrí, var ikki stórvegis av spenningi í dystinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er ikki tað stóra at skriva um dystin millum bestu mansliðini hjá KÍF og Kyndli mikukvøldið. Mett eftir úrslitunum millum liðini fyrr í kappingini, so var einki at ivast í, at talan kundi gerast um ein spennandi dyst, men stóri munurin var, at tað var bert annar parturin, sum hevði nakað at spæla fyri.

Fyrstu løtuna gekk annars javnt á, men tá Kyndil so fyrst hevði togað seg tvey mál framum, góvust kollfirðingarnir fullkomuliga at spæla.

### Summarfrí

Og sum dysturin leið, so gjørdist alt meira greitt, at heimaliðið hevði alt annað enn hendan dystin í tonkunum, soleiðis sum leikararnir spákaðu sær runt á vøllinum.

Við eitt sindur størri nærlagni kundu kollfirðingar annars verið heilt væl við frá byrjan, men teir misnýttu fleiri góðar málmøguleikar, og í verjupartinum stóð alt annað enn væl til. Serliga fekk Ken Zachariasen gott pláss á høgra veingi hjá Kyndli móti einum óvanliga tomum Regini Petersen, og vanligi stórskjúttin hjá kollfirðingunum, Damir Oros, kundi fyri tað gott sitið heima hendan dagin. Eitt mál – við brotskasti – var alt, sum talan gjørdist um frá hansara síðu, og eftir standardinum, sum hann sjálvur hevur sett hetta árið, er tað í øllum førum ikki nakað at tosa um.

Tað skal so leggjast afturat, at skotsterki jugoslavin hóast alt hevði nakrar skotroyndir, men hesar rendu seg allar í sama veggin. Nevnliga Johan Danielsen í Kyndils-málinum, sum enn einaferð vísti, at hann so avgjørt stendur sera ovarliga, tá besti málverjin í landinum skal kjósast. Eitt skifti í fyrra hálvleiki helt hann málið reint í 12 minuttir, og tá Kyndil í seinna hálvleiki slakaði upp á verjupartin, var Johan ferð eftir ferð maðurin, sum syrgdi fyri, at munurin á máltalvuni framhaldandi øktist.

### Frustratiónir

Sum sagt, so tóktist tað leingi so, at kollfirðingar vóru farnir í summarfrí. Men tó ikki meira enn so, at vánaliga avrikið so avgjørt setti síni sálarligu spor. Í løtum vóru frustratiónirnar á liðnum heilt sjónligar, soleiðis at spælið gjørdist beinleiðis ófantaligt og hart. Nakað sum serliga teir hjá Kyndli vórðu revsaðir fyri, tí tendraðir, sum teir vóru, so valdu teir at svara ónollunum hjá KÍF aftur.

Men hetta er tó ikki nakað, sum kemur at kosta liðnum nakað undan næsta dystinum. Tey bæði reyðu kortini, sum vórðu givin, komu bæði eftir tríggjar útvísingar, so tær viðføra ikki leikbann.

### Eftir silvurinum

Meðan kollfirðingar soleiðis eru farnir í summarfrí, hóast teir enn hava ein dyst eftir at spæla, so stendur heilt øðrvísi til hjá Kyndli. Liðið liggur nú somikið væl fyri, at tað væl kann henda seg, at teir ogna sær silvurmerkini á seinasta leikdegi. Hetta um Kyndil vinnur sínar dystir, samstundis sum StÍF gerst meistari við einum sigri í Vestmanna.

Eftir vána úrtøkuna í grundspælinum er einki at ivast í, at hetta er ein støða, sum tey í Kyndli fegnast um, men samstundis er lítið at ivast í, at menn munnu iðra seg nakað um grundspælið. Støðan eftir seinasta umfar kann gerast hon, at Kyndil fær bronsu við 26 stigum, meðan VÍF og StÍF við 27 stigum fáa ávíkavist gull og silvur. Hendir tað, so er einki at ivast í, at teir grønu kunnu peika á nógvar dystir, har írestandi stigið kundi verið fingið til høldar.

Tað er tó ikki so nógv, sum gerast kann við tað, men tað sýnir kanska eisini, hvussu stór broytingin hjá Kyndli hevur verið. Ikki minst tykist setanin av Kára Nielsen á venjarabeinkinum at hava havt stóra ávirkan á liðið. Hetta hevur givið Jacob Jónsson nógv leysari teymar á vøllinum, har hann ikki skal hugsa um alt annað enn sítt egna spæl, eins og tað aloftast er ein fyrimunur at síggja spælið frá síðulinjuni, heldur enn inni á vøllinum, tá taktiskar avgerðir skulu takast. Ikki minst tá hondbóltshøvdið á síðulinjuni er av slíkum kalibri sum tað hjá Kára.

### Dysturin í tølum

KÍF-Kyndil 18-31 (9-17)
Málskjúttar:
KÍF: Vagnur Johannesen 5(5), Mirko Milinkovic 3, Petur Martin Poulsen 3, Regin Petersen 2, Kristian Madsen 2, Gert Hansen 2, Damir Oros 1(1)
Kyndil: Finnur Hansson 6, Jacob Jónsson 5, Ken Zachariasen 5, Høgni Klein 5, Hans Áki Dal-Christiansen 5, Janus Einar Sørensen 2, Rúni Mohr 1(1), Birgir Hansen 1, Josef Abrahamsen 1
Brotskøst: KÍF 8, Kyndil 2
Útvísingar: KÍF 2, Kyndil 7
Diskvalifikatiónir: Kyndil 2 (3X2 minuttir í báðum førum)
Dómarar úr H71: Hallur Danielsen & Bárður Brimvík. Kundu kanska verið meira avgjørdir í nøkrum førum, men hinvegin var dysturin ikki av slíkum slag, har dómararnir alla tíðina vórðu hildnir á tærnum.

### Hondbóltsstøður – 1. Deild kvinnur

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 10 | 9 | - | 1 | - | 0 | 575 | 459 | 116 | 28 |
| 2 VÍF | 11 | 7 | - | 2 | - | 2 | 538 | 448 | 90 | 24 |
| 3 Stjørnan | 11 | 4 | - | 1 | - | 6 | 506 | 505 | 1 | 17 |
| 4 StÍF | 10 | 5 | - | 1 | - | 4 | 522 | 533 | -11 | 17 |
| 5 Kyndil | 10 | 3 | - | 1 | - | 6 | 533 | 549 | -16 | 13 |
| 6 Neistin | 10 | 4 | - | 0 | - | 6 | 455 | 487 | -32 | 13 |
| 7 Tjaldur | 10 | 1 | - | 0 | - | 9 | 416 | 564 | -148 | 3 |

1. Deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 11 | 8 | - | 0 | - | 3 | 722 | 608 | 114 | 25 |
| 2 StÍF | 10 | 7 | - | 2 | - | 1 | 646 | 559 | 87 | 25 |
| 3 Kyndil | 10 | 7 | - | 2 | - | 1 | 614 | 571 | 43 | 22 |
| 4 Neistin | 10 | 4 | - | 1 | - | 5 | 619 | 593 | 26 | 18 |
| 5 KÍF | 11 | 2 | - | 2 | - | 7 | 617 | 657 | -40 | 11 |
| 6 H71 | 10 | 4 | - | 0 | - | 6 | 563 | 652 | -89 | 11 |
| 7 Tjaldur | 10 | 0 | - | 1 | - | 9 | 554 | 695 | -141 | 4 |



VÍF-Stjørnan 23-24 (7-10):

# So var liðugt hjá VÍF



*Eftir sigurin í Vestmanna livir bronsuvónin hjá StÍF framvegis, meðan gullvónin hjá VÍF hinvegin steindoyði við tapinum*

**Stjørnan gav seinastu fátæku vónunum hjá VÍF mønustingin, tá tær vunnu dystin í Vestmanna mikukvøldið, og góvu samstundis sær sjálvum møguleikan fyri bronsuni**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Vónirnar hjá VÍF, nú bert tveir dystir restaðu at spæla, vóru ikki av teimum bestu. Umframt at tær í Vestmanna sjálvar skuldu vinna sínar dystir, kravdust eisini tvey tap frá VB í teirra seinastu dystum, um gullmerkini í kvinnuhondbólti aftur í ár skuldu handast í Vestmanna.

Helst høvdu tey flestu givið upp, tí tað kann so ikki roknast við, at VB fer at missa somikið nógv í seinastu dystunum, men mikukvøldið stóð so greitt, at VÍF heldur ikki megnaði at uppfylla sínar treytir, og so var definitivt liðugt.

### Verjan avgerandi

Stjørnan vann nevnliga dystin í Vestmanna mikukvøldið. Við eini væl virkandi verju og ikki minst eini væl spælandi Agne Masenaite aftan fyri hesa, fingu tær fyrst og fremst steðga álopsmaskinuni hjá VÍF, soleiðis at hendan ongan tíð kom til sín rætt.

Hetta gjørdi, at gestirnir úr Klaksvík í stóran mun eisini fingu frið yvir spælið hjá sær sjálvum, soleiðis at tær í álopunum dugdu at hava neyðuga tolið, og á tann hátt forða fyri vandamiklu kontrarenningunum hjá VÍF.

Tað var tó ongan tíð soleiðis, at nakar av pørtunum setti seg á dystin. Stjørnan hevði at kalla alla tíðina munin, men VÍF slepti ongan tíð endanum. Tvørtur ímóti royndu tær ferð eftir ferð at toga seg inn á Stjørnuna, men tó at tær nakrar ferðir stríddu seg upp á javnt, so var tað bert við fyrsta málinuum í dystinum, at tær vóru frammanfyri. Stjørnan svaraði aftur hvørja ferð, og so hvørt sum minuttirnir fækkaðust, kom sigurin alt nærri.

Tað var tó um reppið, at tað gekk galið móti dystarenda. Stjørnan hevði tá annars vunnið seg trý mál framum, men tá VÍF so aftur minkaði niður í eitt mál, stóð heilt nógv á.

Við sínum seinasta máli í dystinum fekk ein væl spælandi Una Olsen tó sett punktum fyri uppgerðini, og tó at VÍF enn einaferð minkaði, so var tað ikki nóg mikið. Seinasta vónin um gull var burtur, og næsta silvurmerkið á árinum ístaðin veruleiki.

### Svongdin

Og tá alt kemur til alt, so mugu tær í Vestmanna ásanna, at tær ikki hava havt neyðugu styrkina til gullið í ár. Einki er at ivast í, at missurin av Ioanu við kappingarársbyrjan var dyggur smeitur hjá liðnum, tí við hesum mistu tær eitt hitt týdningarmesta álopsvápnið á liðnum, men aðrar orsøkir eru eisini at finna.

Kanska hava hesar fyrst og fremst verið á sálarliga økinum, har ein ávís metta hevur verið galdandi. Í fleiri førum hevur liðið snávað í dystum, sum á pappírinum skuldu givið tvey stig, og tá VB í nógv minni mun hevur gjørt tað sama, so fekk tað neyvan gingið øðrvísi.

Við hesum skal tó einki takast frá VB, sum hevur vunnið eitt uppiborið meistaraheitið. Tær hava ígjøgnum árið verið mest stabila liðið, og so hava tær eisini verið nóg svangar til at geva seg tað lítla pettið eyka, sum so ofta kann vera avgerandi.

Nakað av tí sama hevur Stjørnan eisini havt. Liðið sum í heyst hevði kreppufund, har avgerð skuldi takast um tilmeldingina til kappingina, hevur stóran part av árinum sýnt ein framúr stríðsvilja. Ein stríðsvilja, sum nú møguliga eisini kann bera heiðursmerki við sær. Enn hevur StÍF helst betru kortini á hondini í so máta, men Stjørnan hevur enn møguleikan, og eftir sigurin í Vestmanna eigur teirra møguleiki so avgjørt ikki at útilokast.

### Dysturin í tølum

VÍF-Stjørnan 23-24 (7-10)
Málskjúttar:
VÍF: Sóley Mikkelsen 8(2), Nicoleta Radu 5(3), Jacklin Durhuus 3, Friða Marjunardóttir 2, Alis Høghamar 2, Linda Johannesen 1, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 1, Eyðritt Andreasen 1
Stjørnan: Natasha Stamenkovic 9(2), Danijela Ercevic 4(1), Una Olsen 4, Jastrid Gullaksen 2, Bára S. Klakstein 2, Joan M. Joensen 2, Gunnvør Isaksen 1
Brotskøst: VÍF 5, Stjørnan 5
Útvísingar: VÍF 4, Stjørnan 3
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen.

Tjaldur-StÍF 31-42

## So er klárt

**So er tað við matematiskari vissu greitt, at talan verður um sanna finalu, tá strandingar vitja í Vestmanna á seinasta leikdegi**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað hevur leingi verið mest sum greitt, men nú er tað staðfest. Talan verður um sannan finaludyst, tá strandingar tann 12. apríl vitja í Vestmanna. Undan dystinum hjá StÍF var framvegis ein teoretiskur møguleiki fyri, at Kyndil onkursvegna kundi blanda seg í gullstríðið, men eftir sigurin á Tjaldri er hesin møguleikin nú útihýstur.

Sum skilst, so var ongan tíð nakar serliga ivi um, hvønn vegin tað skuldi fara á Kambsdali, har dysturin mikukvøldið varð leiktur. Til tess vóru strandingarnir alt ov vaknir frá dystarbyrjan, og tá Tjaldur meira ella minni er farið í summarfrí, gjørdist talan ongan tíð um nakran spennandi dyst.

Tíverri hevur tað ikki eydnast okkum at fáa hendur á hagtølunum fyri dystin.

## Tjaldur-StÍF 16-33

**Kvinnurnar hjá StÍF tóku enn eitt fet móti bronsuni, tá tær vunnu trygt á botnliðinum**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eins og hjá monnunum, so hava kvinnurnar hjá Tjaldri ikki tað stóra at spæla fyri, nú landskappingin av álvara er farin at halla. Gjøgnum alt árið hevur liðið staðið mest sum fast á botnsessinum, og mikukvøldið tóktist greitt, at leikararnir nú als ikki hugsa um frammanfyristandandi uppgávurnar.

Eftir eina heldur spaka byrjan, var heilt skjótt, at strandakvinnurnar løgdu sjógv niður til mótstøðuna, og so var tað fyri tað mesta einvegis ferðsla. Serliga tær báðar útlendsku hjá StÍF gjørdu nógv um seg, men tá Tjaldur so fór undir mansverju av hesum, gjørdist støðan bara enn verri. Hetta gav í øllum førum ríkiligt pláss til hinar leikararnar hjá StÍF, og ferð eftir ferð kundu tær mest sum renna beint ígjøgnum Tjaldurverjuna, har rumenski málverjin ikki fekk gjørt stórvegis fyri at bjarga einum sømiligum úrsliti heim.

Og sigurin førdi StÍF heilt nær bronsuni. Kanska var tað ikki heilt eftir teirra høvdi, at Stjørnan skuldi fáa bæði stigini við sær úr Vestmanna, men enn kann StÍF gera alt av sjálvar. Tær eiga heimadyst móti Neistanum, áðrenn tær vitja í Vestmanna, og samanlagt átti hetta at givið betri møguleikar fyri stigum, enn einsamalli dysturin í Vági, sum Stjørnan hevur tilgóðar.

Eins og hjá monnunum var heldur ikki gjørligt at fáa dystarhagtølini hjá kvinnunum, áðrenn blaðið fór til prentingar.